# Í veruleikanum er eingin trygging móti ILA



*- Tað er trupult at umgangast, at ILA-smittan ikki breiðir seg í enn størri mun enn higartil. Fiskur svimur jú í sjónum, og tað er eisini prógvað, at hýsa og sild kunnu gerast sjúk av ILA og bera smittuna við sær, sigur Regin Jacobsen*

**- Gongst, sum ætlað, verður møguligt at koppseta alifisk móti ILA í næstum, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað gongur ikki ov væl hjá føroysku alivinnuni í løtuni. Umframt ILA-smittuna, sum nú hevur breitt seg til 11 aliøkir kring um í landinum, eru klagurnar frá skotskum alarum um føroyskar dumpingprísir ein áhaldandi og tikkandi bumba undir føroysku alivinnuni.

Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, ásannar, at ILA er størsta plágan á heilsuøkinum, sum serliga hevur rakt aliøkir í Norðoyggjum og Eysturoy, men eisini økir aðrastaðni í landinum, eitt nú í Streymoynni og Suðuroy. Einastu økir, sum ikki eru rakt í Norðoyggjum, eru Árnafjørður og Borðoyarvík. Í Suðurstreymi er økið útfyri Argjalandinum rakt, og í Suðuroy er ILA staðfest í Hovi.

- Tá ið eitt aliøki verður rakt av ILA, verður allur fiskurin tikin, og økið skal liggja óbrúkt í eitt hálvt ár. Hetta er ein dyggur smeitur fyri alararnar, hóast tann fiskur, sum ikki er sjúkur, kann seljast. Virðini og úrtøkan verða nógv minni, tí alt má takast - eisini tann parturin, ið ikki er búgvin til tøku.

Regin sigur, at reglugerðin fyri, hvussu ILA-økir skuldu handfarast, byggir á veterineru umstøðurnar. Endamálið er at avmarka smittuvandan, soleiðis at smittan ikki verður flutt millum økini við sjúka fiskinum.

- Men tað er trupult at umgangast, at smittan ikki breiðir seg í enn størri mun enn higartil. Fiskur svimur jú í sjónum, og tað er eisini prógvað, at hýsa og sild kunnu gerast sjúk av ILA og bera smittuna við sær. Tí er heldur ikki óvist, at smittan upprunaliga ikki kann vera borin higar á slíkan hátt.

Stjórin á Bakkafrost sigur, at tað í veruleikanum er eingin trygging ímóti tapi av ILA-smittuni.

- Skuldi eitt alibrúk verið tryggjað ímóti ILA, hevði hetta kostað ov nógv í mun til tað, sum tryggingin gevur. Tí hava alarar onga trygging ímóti ILA, sigur hann.

Um gongdina í alivinnuni, sigur Regin, at samlaðu tonsini, sum verða tikin í ár, helst verða nøkur fleiri enn í fjør, men síðan siga metingar, at ein minking verður í tonsatalinum tey næstu trý árini.

## Koppseting móti ILA

Í løtuni verður arbeitt við at fáa loyvi frá ES at koppseta fiskin móti ILA. Koppsetingarevni er við at verða klárt. ES krevur, at okkara landsdjóralækni leggur fram eina ætlan um, hví vit skulu koppseta fiskin, og hvussu hetta skal fyriskipast. Landsdjóralæknin hevur greitt ES frá hesum, og umsókn um loyvi at koppseta er send, men enn er einki svar komið. Alarar vænta tó, at svarið kemur í nærmastu framtíð.

Regin Jacobsen sigur, at norðmenn hava eisini søkt um loyvi at koppseta, men heldur ikki teir hava fingið hetta loyvi enn.

- Í Kanada hava teir koppsett ímóti ILA í fleiri ár. Í byrjanini gekst nokk ikki so væl hjá kanadiumonnum, men bøtt hevur verið um koppsetingarevnið alla tíðina. Tað eru fleiri feløg, sum framleiða hesi evni. Hinvegin er ILA at meta sum ein influensa ella eitt forkølilsi. Tískil er ikki bara tað eina slagið av ILA-smittu og heldur ikki bara eitt slag av koppsetingarevni. Neyðugt er at finna rætta virusið fyri at kunna finna rætta koppsetingarevni, sigur hann og vísir á, at tað ikki er vist, at vit hava somu ILA-smittu í Føroyum, sum eitt nú í Kanada.

Regin sigur, at ES hevur mett ILA sum eina sonevnda eksotiska fiskasjúku, ið ikki er vanlig á okkara leiðum. Tí hava teir higartil ikki viljað loyvt koppseting.

- Í ES hevur aling sínar røtur í landbúnaðarpolitikkinum, og her finnast nógvar ymiskar reglur um, hvørjum loyvt er at koppseta ímóti, og hvørjum ikki er loyvt at koppseta ímóti. Tað er tí eitt stórt skrivstovuveldi, sum vit skulu sannføra um tað rætta í at loyva koppseting móti ILA. Men eg trúgvi, vit koma har til, at hetta fer at laga seg við loyvinum frá ES.

Hann vísir at enda á, at tá ið aðrar sjúkur raktu alivinnuna síðst í áttatiárunum, varð koppsetingarevni framleitt ímóti hesum sjúkum. Hetta gjørdi, at fiskurin fekk mótstøðuføri ímóti hesum sjúkum. Í dag eru hesar sjúkur als eingin trupulleiki.

- Tí verður mett, at eitt koppsetingarevni ímóti ILA er einasti háttur at sleppa burtur úr ILA sjúkuni í Føroyum, sigur stjórin á Bakkafrost, Regin Jacobsen.



*11 aliøkir eru nú rakt av ILA, síðan smittan fyrstu ferð varð staðfest á Fuglafirði í 2000. Meinast raktir eru alarar í Norðoyggjum og Eysturoynni. Økir, sum verða rakt av sjúkuni, skulu tømast fyri fisk og liggja óbrúkt í eitt hálvt ár.*

*- Eingin verulig trygging er móti tí tapi, sum alarar hava, tá ið fiskurin verður tikin í úrtíð, sigur Regin Jacobsen*



Dumpingákærurnar hjá ES:

# Eitt afturvendandi fyribrygdi hjá føroysku alivinnuni

**- Fáa skotar ikki viðhald í ákærunum hesaferð, kann hugsast, at teir fara at reisa nýggja ákæru um 2-3 ár, og tá kunnu vit aftur koma í somu støðu, sum vit nú eru í, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost**

ALING
*Vilmund Jacobsen*



*- Eg vænti, at vit koma væl burtur úr hesum kærumáli. Hinvegin kann ein slík støða saktans taka seg uppaftur um eini 2-3 ár - alt eftir, hvussu marknaðarstøðan verður til ta tíð. Skotar kunnu jú altíð ákæra okkum aftur, tá ið marknaðurin er trupul. Sostatt kunnu dumpingákærur gerast eitt afturvendandi fyribrigdi hjá føroysku alivinnuni, sigur Regin Jacobsen*

Skotska alivinnan er ikki eins kappingarfør og tann føroyska. Vit megna nevniliga at framleiða alifisk bíligari enn skotar, og tað ger, at vit í fyrstu syftu hava ein fyrimun fram um grannarnar á bretska meginlandinum. Geografiska fjarstøðan og vantandi heimamarknaðurin hjá okkum gevur ivaleyst skotum nakrar fyrimunir, tá ið ræður um sjálvan útflutningin.

Við tað, at skotar ikki eru eins kappingarførir og vit, hava teir tvey í at "velja". Antin noyðast teir at framleiða alifiskin bíligari - ella øðrum lagi kunnu teir gera sítt til at gera okkum minni kappingarførar.

Skotar hava so í øllum førum valt tað seinna - at ákæra føroyingar yvirfyri ES fyri at selja alifisk fyri dumpingprísir.

Tað kann merkja - um skotar hava eydnuna við sær og fáa viðhald í síni kæru - at tollur verður lagdur á allan tann føroyska útflutningin av alifiski. Um so verður, verða vit sjálvsagt minni kappingarførir. Hetta kunnu skotar gera, tí teir eru limir í ES og hava amboðini til tess.

Regin Jacobsen sigur, at skotar soleiðis fingu ES at reisa dumpingákæru móti norskum alarum. Úrslitið gjørdist, at 5% tollur bleiv lagdur á allan norskan laks, sum verður seldur til ES.

- Tað er greitt, at skotar vilja gera tað truplari hjá okkum at koma inn á marknaðin, sigur hann.

## Í Brússell

- Eftir at skotar klagaðu føroyskar alarar fyri at selja alifisk fyri dumpingprísir, avgjørdi ES tann 19. juli í ár kanna sakina. Í august valdu teir at kanna trý føroysk alifeløg sum eina stakroynd av føroysku alivinnuni. Henda kanning varð liðug fyrst í november í ár. ES hevur eisini eftirkannað, at spurnarbløðini, sum føroysku alararnir fingu, eru rætt útfylt.

Regin sigur, at týsdagin í síðstu viku var ein nevnd, umboðandi tey trý alifeløgini, sum eru við í kanningini, umframt Havbúnaðarfelagið, í Brússel og legði føroysku sjónarmiðini fram í samband við kæruna.

Sjálvur var Regin við á hesi ferðini.

- Tað, sum ES nú ger, er, at teir kanna, um hald er í teimum kærupunktunum, sum skotar hava sett fram, og her hevur ES eina fasta mannagongd, tá ið talan er um dumpingákærur.

Hann sigur, at ES í seinasta lagi, 19. apríl, skal hava boðað føroysku alarunum frá, hvør teirra niðurstøða er.

- Men vit vænta, at okkurt verður at frætta um málið longu í desember ella januar, hvussu ES metir støðuna.

Regin sigur, at Havbúnaðarfelagið hevur gjørt avtalu við eitt dugnaligt sakførarafelag í Brússel, sum koyrir málið fyri føroyingar. Hetta felag hevur tikið sær av fleiri slíkum málum fyri onnur lond og veit tískil, hvat málið snýr seg um.

- Tað er soleiðis, at tey trý alifeløgini, sum eru við í kanningini hjá ES, verða viðgjørd hvørt sær. Sostatt kann eitt felag hava nøkur tøl at vísa á, og okkurt annað felag nøkur onnur tøl.

## Hampiliga tryggir

- Vit halda ikki, at føroysku alifeløgini hava nakra dumping, so vit kenna okkum hampiliga tryggar. Men tað er ikki lætt at standa yvirfyri einum pappírsveldi sum ES í slíkum máli í eini tíð, har marknaðurin hevur verið so trupul.

Regin sigur, at skuldi ES kortini komið til ta niðurstøðu, at vit hava dumpað prísirnar, kunnu vit rokna við einum tolli á føroyskum alifiski uppá 5% eini 5 ár fram í tíðina.

- Men eg vænti tó, at vit koma væl burtur úr hesum máli. Hinvegin kann ein slík støða saktans taka seg uppaftur um eini 2-3 ár - alt eftir, hvussu marknaðarstøðan verður til ta tíð. Skotar kunnu jú altíð ákæra okkum aftur, tá ið marknaðurin er trupul. Sostatt kunnu dumpingákærur gerast eitt afturvendandi fyribrygdi hjá føroysku alivinnuni.

Hann sigur, at tá ið prísurin er lágur, kunnu føroyskir alarar antin velja at selja laksin fyri tann prís, ið fæst fyri fiskin - ella lata vera at selja hann, men tað ber heldur ikki til í longdini.

- Einaferð gerast ringarnir fullir av laksi, og tá verður tú noyddur at taka úr teimum, sigur Regin.

## Tað absurda

Føroyar hava fríhandilsavtalu við ES, og tað merkir, at vit hava ongan minstaprís fyri laks.

- Men WTO-reglurnar siga, at tú hevur ikki loyvi at dumpa eina vøru inn í annað land fyri minni enn tað, hon kostar at framleiða. Halda skotar, at tað er hetta, sum føroyskir alarar hava gjørt, noyðast teir eisini at prógva, at teir hava ligið skaða av hesum, sigur Regin.

Hann vísir á, at í øðrum londum, har tey hava ein heimamarknað, verður hesin vanliga brúktur sum barometur fyri prísunum til útflutnings.

- Men tá ið vit ongan heimamarknað hava, verður í staðin hugt at kostprísunum. Síðan siga teir, hvussu stórur vinningurin eigur at vera, og hesum eru vit ikki harrar yvir. Hava vit ikki ein vinning, tá ið laksurin verður útfluttur, sum er t.d. 10% ella 20%, kann ES siga, at vit dumpa vørurnar. Hvussu teir gera sínar útrokningar, vita vit ikki. Sostatt kann ES avgera nógv sjálvt.

Tað absurda í hesum málinum, sigur Regin Jacobsen, er, at størsti parturin av føroyska laksinum fer til Danmarkar.

- Tískil kunnu vit, um ES gevur skotum viðhald, koma at gjalda eini 5% í tolli av vøru, sum fer til ein annan part av ríkinum, sigur stjórin á Bakkafrost.



*- Tað absurda í hesum kærumálinum, sigur Regin Jacobsen, er, at størsti parturin av føroyska laksinum fer til Danmarkar.*

*- Tískil kunnu vit, um ES gevur skotum viðhald, koma at gjalda eini 5% í tolli av vøru, sum fer til ein annan part av ríkinum, sigur hann*